

**Hesir tríggir hava staðið sveinaroynd sum snikkarar á Tekniska Skúlanum í Tórshavn. Frá vinstru: Harry Potts Olsen, lært hjá pf. Byggi Service á Skála, Hjalti Petersen, lært hjá pf. Snikkaravirkið á Kambsdali og Magni Thomsen, lært hjá pf. Byggi Service á Skála** *Mynd: Diml./Jens Kristian*

Sampdoria liggur fremst í italiensku kappingini, Espanol liggur fremst í Spania, meðan Newcastle hevur fult stigatal í Onglandi.

Bert tvey umfør eru leikt í sponsku kappingini. Har liggja í løtuni Espanol, Real Madrid og Deportivo Coruna fremst við fýra stigum. Espanol hevur kortini bestu málskjótingina 8-2. Øll trý liðini vunnu dystirnar í seinasta umfari.

Í Italien eru eisini 2 umfør leikt og har liggja eisni trý lið fremst. Tey eru Sampdoria, Parma og Lazio. Sampdoria hevur 7-0 málmun, Parma hevur 5-0 og Lazio hevur 4-0.

Í Onglandi liggur Newcastle fremst við fullum stigatali fyri fimm dystir. Málmunurin hjá liðnum er 19-5. 2 stig aftanfyri kemur Nottingham Forrest við málmuninum 9-3. Niðast liggur Everton við 1 stigi fyri fimm dystir.

# *Myndaframsýning í Smiðjuni*



*Leygardagin læt upp ein framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við myndum eftir Vígdis Sigmundsdóttur Højgaard, Almu Brend Jóhannsson og Magna Eyvindsson Dalsgaard. Talan er um eina framsýning við klippmyndum, akvarellum, pastellum o. ø.*

*Vígdis (myndin) hevur arbeitt nógv við klippmyndum. Hon er útbúgvin innanduraarkitektur og sjúkrasystur og arbeiðir sum dagligur leiðari á felagsinnkeypsdeildini á Landssjúkrahúsinum.*

*Alma er heimahjálpari og er eisini dagligur leiðari í Samhuga, har tey framleiða tebrøv.*

*Magni er útbúgvin arkitektur og starvast nú sum dagligur leiðari á Leikpalli Føroya.*

*Hesi trý hava áður havt framsýning saman og hvør sær. Eisini hava tey luttikið á ólavsøkuframsýningini og á framsýningum hjá Lions í fleiri ár.*

*Framsýningin er opin til hósdagin 15. september.*



**FSF FINGIÐ ADIDAS SUM KLÆDNASTUÐUL.** Undan landsdystinum seinasta mikudag millum Føroyar og Grikkaland skrivaðu umboð fyri FSF og Adidas undir ein klædnasáttmála. Føroyska landsliðið skal leika allar EM-dystirnar í klæðum frá Adidas, sum Thomas Dam Ítróttur umboðar *Mynd: Diml./Jens Kristian*

# Andre Agassi vann U.S. Open

Amerikumaðurin, Andre Agassi, vann sunnudagin finaluna í U.S. Open móti týskaranum, Michael Stich (ikki Stitsch, sum sagt í útvarpinum). Dysturin endaði 6-1, 7- 6 (7-5) og 7-5.

Roknað varð ikki við av fyrstan tíð, at amerikumaðurin, Andre Agassi, fór at gera seg galdandi í hesi seinasti stóru tennis-kappingini, U.S. Open. Hann varð ikki seedaður áðrenn kappingina, og er fyrsti óseedaði vinnari síðani 1966, tá Fred Stolle (Australia) vann kappingina.

Fimm seedaðir tennisleikarar noyddust geva skarvin yvir, tá teir møttu Agassi í dysti hesaferð. M.a. tapti Thomas Muster fyri Agassi.

Kvinnufinaluna vann Arantxa Sanchez Vicario úr Spania móti Steffi Graf úr Týskalandi. Sanchez vann eisini kappingina í tvímansleiki saman við Jana Novotna úr Kekkia. Tær vunnu móti Katerina Maleeva (Bulgaria) og Robin White (USA).

# Undirgrundin varðveitast á føroyskum hondum

Í tí partinum í samgonguskjalinum, sum viðvíkur oljuvinnu, siga Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Verkamannafylkingin og Sjálvstýrisflokkurin, at undirgrundin skal varðveitast á føroyskum hondum. - Annars hevði Gørtz-nevndin mælt til at selja dønum rættindini til nýtslu.

Flokkarnir eru samdir um, at í sambandi við útbjóðing av rættindum til seismiskar kanningar og eftirfylgjandi rættindi at gera boringar, eigur dentur at verða lagdur á at fáa sum mest burturúr búskaparliga, bæði við beinleiðis gjøldum og fyri rættindini og at fáa føroyingar í vinnu hjá oljufeløgunum, og treyta okkum, at so nógv sum gjørligt av tænastuveitingum verða gjørdar av føroyingum og føroyskum fyritøkum.

# *Føroyska fótbóltskappingin*

***úrslit og støður***

## 1. DEILD MENN (16. umfar)

**Úrslit og mál:**

**NSÍ-TB 2-2 (0-1)**
0-1 Herman Mortensen
1-1 Arfinn Langgaard
2-1 Jónsvein Peteresen
2-2 Hans Hammer

**B36-GÍ 2-5 (0-2)**
0-1 John Petersen
0-2 Henning Jarnskor
0-3 John Petersen
1-3 Edvard Apalkov
1-4 Pauli Jarnskor (br.)
1-5 John Petersen
2-5 Gunnar Nielsen

**ÍF-HB 1-7 (0-2)**
0-1 Gunnar Mohr
0-2 Julian Johnsson
1-2 Ken Bærentsen
1-3 Gunnar Mohr
1-4 Jan Dam
1-5 Andreas F. Hansen (br.)
1-6 Gunnar Mohr
1-7 Gunnar Mohr

**KÍ-B68 6-3 (5-1)**
1-0 Kurt Mørkøre
2-0 Kurt Mørkøre
3-0 Kurt Mørkøre
4-0 Kurt Mørkøre
4-1 Súni Fríði Johannesen
5-1 Poul Juul Vilhelmsen
5-2 Aksel Højgaard
5-3 Páll Didriksen
6-3 Arnold Joensen

**EB/Str.-B71 0-3 (0-2)**
0-1 Ib Mohr Olsen
0-2 John Sørensen
0-3 John Sørensen

**Toppskjúttar:**

| | |
|---|---|
| John Petersen, GÍ | 18 |
| Gunnar Mohr, HB | 14 |
| Eyðun Klakkstein, KÍ | 12 |
| Allan Mørkøre, KÍ/B36 | 10 |
| Djóni N. Joensen, NSÍ | 8 |
| Bogi Johannesen, TB | 8 |
| Kurt Mørkøre, KÍ | 8 |

| 1. deild menn | | | | EB/Str. | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36 | □ | 2-3 | 0-2 | 25.sep | 2-5 | 1-3 | 2-1 | 0-4 | 2-0 | 6-0 |
| B68 | 0-0 | □ | 0-0 | 4-1 | 0-7 | 2-2 | 1-0 | 3-0 | 3-2 | 18.sep |
| B71 | 18.sep | 2-0 | □ | 5-1 | 1-2 | 1-2 | 3-0 | 2-0 | 1-0 | 4-1 |
| EB/Streymur | 1-1 | 0-0 | 0-3 | □ | 0-1 | 0-3 | 0-0* | 2-2 | 18-sep | 0-5 |
| GÍ | 2-0 | 5-2 | 1-1 | 9-0 | □ | 4-1 | 18.sep | 0-2 | 2-1 | 4-1 |
| HB | 5-0 | 0-0 | 1-0 | 4-0 | 1-0 | □ | 1-0 | 18.sep | 3-0 | 7-0 |
| ÍF | 2-2 | 1-0 | 25.sep | 4-2 | 0-2 | 1-7 | □ | 1-2 | 3-1 | 1-2 |
| KÍ | 1-1 | 6-3 | 0-2 | 8-2 | 25.sep | 0-2 | 2-0 | □ | 2-2 | 2-1 |
| NSÍ | 3-0 | 25.sep | 0-1 | 4-2 | 0-1 | 4-1 | 3-1 | 2-1 | □ | 2-2 |
| TB | 1-21-0 | 3-2 | 4-1 | 3-5 | 25.sep | 5-1 | 0-6 | 2-3 | | □ |

*EB/Streymur-ÍF 26/6 upprunaliga 3-3, men EB/Str. kærdi og varð síðani dømt at vinna 0-0.

### 1. DEILD MENN (18)

Sí úrslitini omanfyri.

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ (M) | 16 | 13 | 1 | 2 | 50 -15 | 27 |
| HB | 16 | 12 | 2 | 2 | 43 -13 | 26 |
| B71 | 16 | 10 | 2 | 4 | 30 -11 | 22 |
| KÍ (S) | 16 | 7 | 3 | 6 | 38 -23 | 19 |
| B68 | 16 | 5 | 5 | 6 | 21 -29 | 15 |
| NSÍ (U) | 16 | 6 | 2 | 8 | 27 -27 | 14 |
| TB | 16 | 6 | 1 | 9 | 31 -46 | 13 |
| B36 | 16 | 4 | 4 | 8 | 21 -33 | 12 |
| ÍF | 16 | 3 | 1 | 12 | 16 -35 | 7 |
| EB/Str. (U) | 16 | 1 | 3 | 12 | 12 -57 | 5 |

**17. umfar 18. september:**

| | |
|---|---|
| EB/Str.-NSÍ | Jónfinn Olsen |
| B71-B36 | Niklas á Líðarenda |
| GÍ-ÍF | Petur E. Kjærbo |
| HB-KÍ | Baldvin Baldvinsson |
| B68-TB | Nemus N. Djurhuus |

### 2. DEILD MENN (18)

| | |
|---|---|
| VB-LÍF | 6-2 |
| Royn-B68 | 8-0 |
| NSÍ-HB | 2-0 |
| FS Vágar-Sumba | 0-1 |
| KÍ-SÍ | 2-2 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| VB (N) | 16 | 14 | 1 | 1 | 56 -11 | 29 |
| FS Vágar | 16 | 11 | 2 | 3 | 49 -14 | 24 |
| LÍF (N) | 16 | 11 | 1 | 4 | 41 -30 | 23 |
| HB (U) | 16 | 9 | 0 | 7 | 47 -42 | 18 |
| Sumba | 16 | 7 | 3 | 6 | 19 -21 | 17 |
| Royn | 16 | 4 | 6 | 6 | 29 -26 | 14 |
| SÍ | 16 | 5 | 3 | 8 | 33 -35 | 13 |
| KÍ | 16 | 2 | 4 | 10 | 23 -37 | 8 |
| B68 | 16 | 3 | 1 | 11 | 16 -50 | 7 |
| NSÍ (U) | 16 | 3 | 1 | 12 | 21 -68 | 7 |

**17. umfar 17. september:**

| | |
|---|---|
| KÍ-VB | Sunleiv Højgaard |
| SÍ-Royn | Suni Johansen |
| B68-NSÍ | Andrias Poulsen |
| HB-FS Vágar | Kim Ejdesgaard |
| Sumba-LÍF | Tórur Holm |

### 3. DEILD MENN (18)

| | |
|---|---|
| LÍF-TB | 2-3 |
| B36-GÍ | 1-2 |
| ÍF-HB | 1-2 |
| KÍ-FS Vágar | 1-1 |
| EB/Str.-Skála | 1-2 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ | 16 | 11 | 0 | 5 | 55 -29 | 22 |
| HB (U) | 16 | 10 | 2 | 4 | 40 -27 | 22 |
| B36 | 16 | 9 | 3 | 4 | 40 -22 | 21 |
| Skála (N) | 16 | 9 | 2 | 5 | 49 -22 | 20 |
| FS Vágar (N) | 16 | 9 | 2 | 5 | 48 -27 | 20 |
| ÍF | 16 | 8 | 1 | 7 | 42 -28 | 17 |
| KÍ | 16 | 6 | 4 | 6 | 48 -36 | 16 |
| EB/Streymur | 16 | 5 | 2 | 9 | 29 -46 | 12 |
| TB | 16 | 3 | 1 | 11 | 24 -55 | 7 |
| LÍF (U) | 16 | 1 | 1 | 14 | 12 -95 | 3 |

**17. umfar 18. september:**

| | |
|---|---|
| EB/Str.-LÍF | HB |
| Skála-B36 | LÍF |
| GÍ-ÍF | B68 |
| HB-KÍ | B36 |
| FS Vágar-TB | Suni Johansen |

### 1. DEILD KVINNUR (12)

| | |
|---|---|
| ÍF-Skála | 1-1 |
| KÍ-EB | 8-0 |
| B36-Sumba | 2-0 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| HB (M) | 11 | 10 | 0 | 1 | 38 - 9 | 20 |
| B36 (S) | 11 | 9 | 1 | 1 | 40 - 9 | 19 |
| KÍ | 11 | 5 | 3 | 3 | 26 -16 | 13 |
| ÍF (U) | 11 | 4 | 3 | 4 | 15 -24 | 11 |
| Skála | 12 | 1 | 4 | 7 | 9 -28 | 6 |
| Sumba | 11 | 1 | 3 | 7 | 5 -18 | 5 |
| EB | 11 | 1 | 2 | 8 | 6 -35 | 4 |

VB hevur tikið seg úr kappingini, og tí leika eftirverandi liðini ikki um niðurflyting.

**Seinasta umfar 18. september:**

| | |
|---|---|
| EB-ÍF | NSÍ |
| Sumba-KÍ | VB |
| HB-B36 | Kim Ejdesgaard |



*John Petersen má sigast at geva GÍ valuta fyri hvørja krónu. felagið brúkar uppá hann í flogbillettum. Hann kann snøgt sagt gerast munurin millum FM og silvur. - Tað man vera nógv ár síðani nakar hevur skorað so nógv mál eitt kappingarár í 1. deild. Her í nærdysti við Tummas Eli Hansen hjá B36 sunnudagin.*

### 4. DEILD MENN

**Endaumfar**

**Seinna fjórðingsfinala**
SKÁLA-B71 (úts. 4/9) 2-2
Dysturin varð leiktur í Havn

**Fyrra semifinala**
ÆSIR-B71 1-0
B36a-SKANSINa 1-0

### 5. DEILD MENN

**Endaumfar**

**Dystur um 3. pláss**
TB-HBa (í Vági) TB u.d.

**Finala**
VB-HBb (á Tvøroyri) 2-3

**Endaliga úrslitið:**
HBb vinnari av 5. deild (gull)
VB nr. 2 (silvur)
TB nr. 3 (bronsa)
HBa nr. 4



### UNGLINGAR

**FM-bólkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| B36a-NSÍ | | | 3-0 |
| Kla-HB | úts. (leikast 12/9) | | |
| B36a | 5 | 11- 4 | 7 |
| NSÍ | 5 | 12-10 | 6 |
| HB | 4 | 14- 5 | 5 |
| Kla | 4 | 4-22 | 0 |

Støðan í unglingadeildini verður í blaðnum aftur hósdagin.

### 2. DEILD KVINNUR

| | | | |
|---|---|---|---|
| B36-GÍ | | | 2-1 |
| GÍ | 7 | 26- 4 | 10 |
| NSÍ | 7 | 30-10 | 10 |
| B36 | 7 | 14-18 | 8 |
| FS VÁGAR | 6 | 26-14 | 6 |
| AB | 7 | 7-57 | 0 |

**Útsettir dystir:**
6/8 FS VÁGAR-GÍ
20/8 NSÍ-B36 (leikast 14/9)

*Úrslit og støður í hinum deildunum koma í blaðið hósdagin*